# Vallaraheimið í Klaksvík skift eigara



*Elin Frederiksberg handar her Krisfinni lyklarnar til vallarheimið í Klaksvík. Hini á myndini eru: Maria, kona Krisfinn og dóttir Elina, Ása*

**Beint eftir páskir keypti Krisfinn Christiansen vallaraheimið í Klaksvík frá Elin Frederiksberg, sum hevði tað saman við manni sínum í umleið 30 ár**

KEYP
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Vallaraheimið hevur staðið til sølu í yvir eitt ár nú, onkur hevur víst áhuga, men nústani tykist sum tað er endaliga selt og avgreitt. Krisfinn og Maria Christiansen fara framyvir at reka vallaraheimið, sum hevur eini 50 seingjarpláss íalt.

Krisfinn og Maria gjørdu av at keypa tað eftir stutta umhugsingartíð.

Maria sigur, at tað hendi við eini rúkandi ferð, frá tí at tey gjørdu av at keypa til alt var avgreitt. Tey bæði siga, at tey hava stóran áhuga fyri ferðavinnuni, sum mennist alt meira og meira.

Seinnu árini kann ein tó siga, at tað ikki hevur verið so nógv at hoyrt til Vallaraheimið í Klaksvík, men tað sigur Maria, at tey fara at royna at broyta. Ætlanin hjá teimum er, at heimið skal gerast alt meiri sjónligari fyri ferðafólk – útlendsk sum føroysk.

– Vit vóna, at undirtøkan verður góð, og at tað fer at ganga væl sjálvandi, sigur Maria. Vallaraheimið og gistingarhúsið í Klaksvík, sum liggur við Garðavegin, verður opið alt árið runt, men um veturin verður tað meiri avmarkað. Maria sigur tó, at tað fer at verða so, at fólk altíð kunnu fáa fatur á teimum.

Spurd um tey ikki fara at troyttast skjótt av hesum, tí tey arbeiða harðast, tá hini hava frí, svara Maria flennandi, at tað væntar hon als ikki.

– Vit gleða okkum at sleppa í gongd ordiliga, og vit kunnu altíð fara at ferðast, tá hini eru liðug, sigur hon.

Vallaraheimið er í tveimum hæddum. Á tí ovaru er eitt gistingarhús, sum hevur tvær stjørnur av fimm møguligum. Sjálvt vallaraheimið er á niðaru hædd, og tað hevur tvær stjørnur av trimum møguligum.

Við síðuna av er eitt tómt høli, sum varð nýtt til handil fyrr. Krisfinn og Maria hava ikki endaliga gjørt av, um tey fara at leiga tað út, ella um tey fara sjálvi at nýta tað.

## Lymfødemfelagið hevur fingið nýggjan formann

TÍÐINDASKRIV

Fía í Túni av Toftum er nýggjur formaður í Lymfødemfelagnum

Á aðalfundi felagsins 29. mars stóðu 2 nevndarlimir, Henny Biskopstø og Ásla Stenberg, og tiltakslimurin Minna á Hædd, fyri vali. Henny Biskopstø tók ikki við afturvali, meðan Ásla Stenberg og Minna á Hædd halda fram í nevndini. Nývald í nevndina er Elsa Wolles.

Henny Biskopstø hevur verið formaður seinastu 5 árini og annars verið nevndarlimur, síðani felagið varð stovnað í 1996.

Nevndin hevur skipað seg soleiðis: Fía í Túni, formaður, Harriet Nybo, næstformaður, Arnhild Johannesen, kassameistari, Ásla Stenberg, skrivari, og Elsa Wolles, nevndarlimur. Tiltakslimir eru Minna á Hædd og Eyðbjørg Djurhuus.

## Alternativ bústaðarbygging

TÍÐINDASKRIV

Í fjør heyst settu landsstýrismaðurin í familju- og heilsumálum og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ein arbeiðsbólk at gera eina frágreiðing um alternativa bústaðarbygging. Ætlanin er at leggja frágreiðingina fyri Løgtingið til aðalorðaskiftis í komandi tingsetu.

Frágreiðingin er nú liðug og verður handað landstýrismonnunum Bill Justinussen og Kartsten Hansen mánadagin 28. apríl 2003, kl. 9:00-10:00 í fundarhølinum í Familju- og heilsumálaráðnum á Eirargarði 2.

## Matiné í Havnar Kirkju við Tariru



TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 26. apríl verður Matiné løta í Havnar Kirkju kl. 11.30. Tað er kórið Tarira, undir leiðslu av Sunleifi Rasmussen, ið framførir úrvæl av teirra várkonsert skrá. Í høvuðsheitum verða sangir og verk framførd eftir føroyskum og norðurlendskum tónasmiðum, umframt renesancu tónleikur.

**Sangarar**
Sopran: Berghild Poulsen, Joanna Johansen, Arina Bischoff, Unn Paturson, Urd Johannesen
Alt: Píl Reinert, Gunnvør Poulsen, Durita Eliasen, Elspa Samuelsen
Tenor: Peter Niclasen, Hans Debes, Pauli Hansen, Uni Petersen
Bass: Eyðun Eliasen, Høgni Debes, Andrias Petersen, Niels Winther, Fróði Sandoy
Kórleiðari: Sunleif Rasmussen





*Per Zachariassen er ein av tungu dreingjunum í danska sjónvarpsheiminum. Nú leggur hann vekt á at gera Prix finaluna til ein dygdargóða sjónvarpssending*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Prixið skal vera sjónvarpssending

**Per Zachariassen, ið er komin til landið at produsera Prix finaluna fyri Sjónvarp Føroya ætlar hesaferð at gera tað, sum fyrr hevur verið ein filmað konsert, til eina sjónvarpssending**

PRIX FØROYAR
*Rúnar Reistrup*

Prix Føroyar skal nú vera meira hyggjaravinarligt. Sjónvarp Føroya, sum er ein av trimum høvuðskreftum handan Prix Føroyar, hevur sett sær fyri at gera nógv burturúr beinleiðis sjónvarpssendingini frá Prix finaluni, og í hesum sambandi hevur stovnurin leigað ein tann besta sjónvarpsprodusaran í Danmark, føroyingin Per Zachariassen.

Og føroyski produsarin ætlar sær at bróta upp úr nýggjum fyri geva sjónvarpshyggjarum eina so góða uppliving sum møguligt.

- Fólk kring landið skulu fáa eina kenslu av, at Prix finalan er gjørd fyri teirra skyld, og ikki bara er nakað, sum hendir í Norðurlandahúsinum. Tey skulu kenna seg sum ein part av finaluni og soleiðis eisini fáa størri áhuga fyri at fylgja henni, ljóðar hugsjónin hjá Per Zachariassen, nú hann liggur leysur í luftini fyri at fáa Prix Føroyar at taka seg væl út á sjónvarpsskermunum leygarkvøldið.

### Tillaga Prixið

Sambært føroyska produsaranum er Prix Føroyar ikki nakað idealtiltak til sjónvarpsframleiðslu.

- Eg síggi Prix Føroyar finaluna sum eina rocktónleikakapping og sum so er hon kanska meira egnað sum konsert enn sum sjónvarp, tí tónleikurin er heldur smalur. Fyri mær er idealtiltakið til sjónvarpsframleiðslu eitt konsept sum "Stjerne for en aften", tí har kunnu øll vera við. Tað hava vit sæð eitt týðulig prógv fyri, ikki minst her í Føroyum, sigur Per Zachariassen.

Tí hevur hann eisini heitt á fyrireikararnar um at tillaga Prix Føroyar konseptið til at hóska betur sum sjónvarpssending. Millum annað við at skipa fyri hyggjaraatkvøðugreiðslu.

- Higartil hava sendingarnar frá Prix finalunum mest av øllum verið filmaðar konsertir. Nú skal finalan vera ein sjónvarpssending. Til tess at røkka hesum havi eg millum annað roynt at fingið hyggjaratkvøður til at gerast ein part av Prix finaluni. Soleiðis kann man fáa hyggjararnar við, og tað er ein umráðandi partur av einari góðari sjónvarpssending, sigur Per Zachariassen.

### Skilir ikki ónøgdina

Hann er ikki óvitandi um ta ónøgd, sum stóðst millum tónleikararnir í finalubólkunum um júst hesa broytingina, men hann hevur ilt við at skilja ónøgdina.

- Eg eri ósamdur við tónleikarunum, sum hava so nógv ímóti hesum broytingum, og vit hava havt eina diskussión saman um tað. Soleiðis sum eg síggi tað, so eru tónleikararnir bara luttakarar í hesari kappingini, og tí eg skilji ikki hví teir blanda seg so nógv upp í dømingina. Dømingin er ikki teirra borð.

### Nokkso improviserað

Sjálvur er Per rættiliga spentur um, hvussu alt fer at rigga, tí arbeiðið við Prix finaluni er nakað øðrvísi, enn hann er vanur við.

- Vanliga brúkar man nógva tíð uppá at venja allar mannagongdir undan einari beinleiðis sjónvarpssending, soleiðis at alt kann leggjast til rættis niður í smálutir. Men tað ber ikki til við Prix finaluni. Har verða nógvir luttakarar, og vit hava lítla tíð at venja, og tí vera nógv fleiri ókendir faktorar undir framleiðsluni av Prix finaluni, enn eg eri vanur við. So tað verður helst nokkso improviserað, sigur Per Zachariassen, sum sjálvur fer at uppliva finaluna frá einum sendibili uttan fyri Norðurlandahúsið, har hann skal stýra beinleiðis sendingini.

### Serkunnleika við sær

Hann fer tó ikki at stýra showinum í blindum, tí við sær til Føroya hevur hann fleiri góð fólk, sum júst hava sum uppgávu at minka um tilvildina. Eitt av fólkunum, ið eru komin til landið saman við føroyska produsaranum, er ein sonevndur "floor-manager", hvørs arbeiði er at syrgja fyri, at røttu fólkini koma á rætt stað á pallinum í røttu tíð.

Afturat sær hevur Per eisini ein produsara-assistent, sum millum annað arbeiðir við at greina allan tónleikin, sum fer at verða spældur á Prix finaluni, soleiðis at produsarin altíð veit hvat hendir hvar í hvørjum lagi hjá hvørjum bólki.

Í ferðalagnum saman við Peri eru eisini ein teknikkari til at standa fyri samskiftinum millum sjónvarpsfólkini, ein kameramaður, ið skal føra eitt sonevnt "steady-cam" uppi á pallinum og ein annar kameramaður, ið skal stýra einum kamerakrana, ið er útgjørdur við einum átta metrar longur armi.

- Hetta eru alt fólk, sum eg eri vanur at arbeiða saman við og sum hava serkunnleika og drúgvar royndir innan hvør sítt øki, og tí havi eg valt at taka tey við. Í Sjónvarpi Føroya finnast eisini nógv dugnalig fólk, men eingin teirra hevur rutinu í til dømis at føra eitt steady-cam ella ein átta metrar langan krana beint yvir høvdinum á eini áhoyrarafjøld, og tí havi eg valt at fáa fólk uttanifrá at hjálpa við tí, greiðir Per Zachariassen frá.

### Byrjaði í Sjónvarpinum

Per Zachariassen byraði heilt ungur sína lívsleið innan sjónvarpsframleiðslu sum AV-teknikaralærlingur á Sjónvarpi Føroya. Har var hann millum annað við til at framleiða gitnu sendirøðini um "Dólgarnar".

Seinni fór hann til Danmarkar og tók har útbúgving sum sjónvarpsprodusari á Danska Filmskúlanum.

Eftir lokna útbúgving fekk hann starv hjá Danmarks Radio, og gjørdi har rættiliga vart við seg sum partur av framleiðsluliðnum handan sendingina "Transit". Síðan tá hevur hann starvast nógv fyri Danmarks Radio og fyri ymisk filmsframleiðslufeløg. Hann var við til at gera sendingina "Den store klassefest", ið fyrst varð send í Danmarks Radio og síðan er seld til fleiri sjónvarpsstøðir í øðrum londum.

Okkurt hevur Per Zachariassen eisini fingið av skafti her í Føroyum seinnu árini. Saman við øðrum hevði hann eitt skifti føroysku fyritøkuna Coronafilm, sum gjørdi sendingarnar "Ein gerandisdagur" fyri Sjónvarp Føroya, og seinast hevur hann sum partur av donsku fyritøkuni Blu Entertainment produserað sendingina "Satsa", ið fyrst varð royndarkoyrd í Sjónvarpi Føroya og sum nú eisini koyrir í donskum sjónvarpi undir heitinum "Boxen".